*Sølustjórin hjá Kemilux væl nøgdur við oljumessu:*

# Av stórum týdningi at kenna krøv

*-Hetta var ein frálík oljuframsýning. Vit hava fingið samband við nógvar fyritøkur. Ikki minst haldi eg tað er umráðandi, tá tú luttekur á slíkari framsýning, at tú lærir krøvini hjá øðrum at kenna sigur sølustjórin hjá Kemilux, Karl á Høvdanum, sum júst er heimafturkomin av oljuframsýningini í Aberdeen*




*Karl á Høvdanum her við "Kemiluxpakka", sum varð vístur fram á føroyska básinum á oljumessuni í Aberdeen í farnu viku. Mynd jan*

Millum luttakararnar á "Offshore Europe" oljumessuni í Aberdeen í farnu viku var eisini ídnaðarvirkið Kemilux í Havn. Hetta virkið framleiðir og selur nógv ymisk reinsievni á heimamarknaðinum og í útlandinum. Sølan er í løtuni helvt um helvt til heimamarknaðin og til útflutnings.

Nú verður so roynt at taka eitt stig víðari fyri at fáa fótin enn meira fastan á meginlandinum.

Tað er nýggi sølustjórin hjá Kemilux, Karl á Høvdanum, sum stendur á odda fyri hesi ætlan.

Í tí sambandi vóru nøkur umboð fyri fyritøkuna við á oljuframsýningini í Aberdeen alla farnu viku.

Umframt sølustjóran var eisini Johan Eysturoy, stjóri og Magnus Pauli Magnussen, kemikkari.

Aftaná stevnuna spurdu vit Karl á Høvdanum, hvat teir fingu burtur úr at vera við á hesi fyrstu oljuframsýningini?

-Vit hava áður luttikið í fleiri fiskarímessum eitt nú í Danmark og í Skotlandi. Á messuni í Aberdeen fyrr í ár fingu vit samstarv við útlendska fyritøku, sum skal hjálpa okkum at fáa samband við lokalar umboðsmenn í bæði Skotlandi, Bretlandi, Írlandi og Hálandi. Tað hava vit so arbeitt víðari við. Sum heild haldi eg vit hava fingið nógv burtur úr hesar dagarnar. Tú kemur í samband við nógvar fyritøkur og fólk og tú gert vart við, at tú ert til. Tú finnur fram til, hvar tú skal leita eftir teimum røttu kundunum. Og ikki minst, so fært tú eina fatan av, hvat tað eru fyri krøv, sum brúkarin setir til slíkar vørur, ið vit framleiða sigur Karl á Høvdanum.

Hann heldur tað vera ein góðan máta at marknaðarføra Føroyar og føroyskar vørur á henda hátt at seta upp ein bás saman og sigur seg vera sera væl nøgdan við samstarvið við Menningarstovuni, sum hann heldur hevur dugað væl at samskipað tiltakið.

Eisini heldur sølumaðurin hjá Kemilux, at føroyski básurin virkaði sera væl. Ikki minst rósar hann teimum ungu fólkunum, sum vóru á básinum og tóku ímóti fólki.

Eg haldi, at hetta at bara nøkur fá ung fólk vóru á básinum og síðani kundu gera avtalur millum kundar, vitjandi og okkum, sum vóru við á básinum var ein frálík skipan. Tá kundu vit bæði fara út til onnur á framsýningini umframt at vera tøk, tá avtalur vórðu um at hitta møguligar kundar og áhugað.

Karl á Høvdanum heldur, at Kemilux hevur góðar framtíðarmøguleikar. Tað vísir í hvussu so er áhugin fyri og eftirspurningurin eftir fleiri av vørunum, eitt nú rustloysara og einum á sápuevnunum.

Meiningin er sjálvandi at marknaðarføra alt okkara program, men ávísar vørur eru meira eftirspurdar sigur hann og vísir her til skipasmiðjurnar og supplyskipini í oljuvinnuni.

Higartil hevur ein donsk fyritøka selt sápu fyri Kemilux serliga til frálandavinnuna. Hetta er eitt arbeiði, sum Kemilux nú sjálvt ætlar at gera meira við.

Upp á fyrispurning hvussu tað ber til at eitt føroyskt virki skal kunna kappast við stóru útlendsku virkini, tá talan er um nakað so "vanligt" sum sápu og reinsievni sigur Karl á Høvdanum, at teir hava fleiri góðar vørur, sum ikki minst hava verið royndar eitt nú umborð á føroyskum skipum við góðum úrsliti.

-Vit hava tí drúgvar royndir at byggja á, nú er so eftir at fáa eygunum upp hjá fleiri í eitt nú frálandavinnuni fyri hesum vørum sigur ein vælnøgdur og annars virkin sølumaður, sum dámdi betur at luttaka á hesi messuni enn á teimum undanfarnu fiskarímessunum.

jan




*Á stóru oljumessuni í Aberdeen vórðu allan dagin gjørdar bæði sjónvarps- og útvarpssendingar umframt, at blað varð givið út. Teir, sum stóðu fyri útvarpingini, lutaðu út sum vinning, ein ferð fyri tvey til Føroya við Smyrli. Tað var blaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller, sum dró teir heppnu vinnararnar. Her síggja vit vinnararnar saman við formanninum í Oljuráðleggingarnevndini, Arnu Olafson, og Magna Arge, formann í Føroya Oljuídnaði. Útvarpið hevði um sama mundið samrøðu við teir báðar um føroysku luttøkuna á messuni. Mynd jan*